sosialurin
Internet: http://www.cybernet.dk/faroe-news

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Kristjan Dahl
Lýsingar og søla: Maria Brøðraberg

Blaðfólk: Randi Jacobsen, Áki Bertholdsen, Eirikur Lindenskov, Eyðun Klakkstein, Fróði Lækságarð, Magnus Dam

Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bustaður: Argjavegur 26, Argjum
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn

Telefon: 11820
Telefax: 14720

e-mail: sosialur@olivant.fo

Samstarv á Atlantsmótinum

Oddagrein

TAÐ var tann tíð, tá føroyingar høvdu ávíst samstarv við grannar okkara hetlendingar. Ikki var tað nógv, men vit dystaðust í fótbólti gjøgnum mong ár.

NÚ tað her í blaðnum í gjár verður skotið upp av fólki á Suðuroyggjum (Hebridunum), at teir fýra oyggjabólkarnir Hetland, Orknoyggjar, Hebridurnar og Føroyar áttu at knýtt tættari samstarv, man tað uttan iva vinna undirtøku millum mong her heima. Tí hvat er meira natúrligt enn at fýra fjarskotnir oyggjabólkar, sum í mongum eru so meinlíkir, hava tættari samstarv?

FER tú veruliga at hugsa um henda spurning, kemur tú til tá niðurstøðu, at tað er nú rættuliga løgið, at tað ikki longu finst eitt samstarv millum hesar oyggjar á Atlantsmótinum. Tí leita vit aftur í søguna, so eru vit runnin av somu ætt. Víkingarnir komu til allar hesar oyggjabólkar og tóku tá bæði mál og mentan við sær. Hesi livdu millum manna í øldir fyri so seinni at verða troðkað burtur av útlendskum.

NORRØNI upprunin og felagsarvurin megnaðu so dánt at yvirliva í Føroyum men fór fyri skeytið á hinum oyggjunum fyri eystan og sunnan. Keltiska árinið varð so mikið stórt, at bæði hetlendingar, orknoyingar og fólkið á Hebridunum mistu sítt mál, og flestu av forn-norrønu siðunum hvurvu ella vórðu traðkaðir í fót. At føroyingar ikki endaðu í sama báti kunnu vit takka teimum kreftum í Føroyum fyri, sum striddust fyri málinum. Ein kann siga, at tað var málsliga neyðtøkan úr ávíkavist Bretlandi og Danmark, sum gjørdi av við og mundi gjørt av við norrøna upprunan hjá øllum hesum nevndu oyggjabólkum.

Í dag síggja mong fólk í Hetlandi, á Orknoyggjum og á Hebridunum tann norrøna upprunan meira sum sín identitet enn tann keltiska. Og tað er kanska heldur ikki so løgið. Tí fyri hesar oyggjabúgvar livir enn tað norrøna, um ikki í gerandisdegnum, so tó á mangan hátt í mentanini, í staðnøvnum o.s.fr. Vit vita eisini, at fólkini á hesum oyggjum høvdu sítt egna serstaka norrøna mál.

TAÐ var so eisini tann tíð, tá allir oyggjabólkarnir vóru undir sama løgmanni frá tí tíðini, at teir allir hoyrdu til Noreg. Tíðin skuldi broyta hetta, og í dag má sigast, at lítið og einki samband er millum umrøddu oyggjabólkar. Leita vit tó nøkur hundrað ár aftur í tíðina, so tykist meira samband hava verið. Eitt er so eisini tað, at hetlendingar lærdu føroyingar át fiska og í ta nyggjari tíð, tá sildin var uppá tað mesta, var ávís samvinna millum føroyingar og Hebridurnar.

NÚ er annað eisini, sum samvinna hevur verið um, men samanumtikið kann sigast, at hesir fýra oyggjabólkar kundu einsvæl ligið í hvør sínum herðashorni av knøttinum, so lítið hava vit við hvør annan at gera.

EIN slík ásannan kemur í tøkum tíma og skal hon vera við til at rudda slóð fyri eini framtíðar samvinnu. Í samrøðuni við Sosialin í gjár sigur umboð fyri myndugleikarnar og ídnaðin á Suðuroyggjum, at nú Atlantsmótið tykist kunna gerast ein nýggjur oljulandsluti, tá átti at borið til at ment samvinnuna millum oyggjabólkarnar í hesum partinum av heiminum. Givið er at øktir vinnumøguleikar í júst hesum útjaðar annars kunnu verða júst tað skumpið, tað instrumentið, sum skal til fyri at byggja brýr millum Føroya, Hetland, Orknoyggjar og Hebridurnar.

TAÐ skal vera okkara vón, at henda tilvildarliga samrøða á eini oljumessu í sjálvum ættlandinum Noregi kann vera spírið til eina samvinnu á Atlantsmótinum, eina samvinnu, sum kann fevna um bæði vinnulív og mentan, eina samvinnu, sum fær hesar oyggjabúgvar at finna saman aftur og draga fram tann felags identitet og uppruna, sum hevur eyðkent teir frá fornari tíð. Mentan og vinnulív kunnu vera við til at stuðla uppundir hvørt annað.

Sosialurin

Burturvið at tosa um tvangsflyting av skúlanæmingum

Viðmerking

Torfinn Smith skrivar

Sjálvandi eiga vit ikki at víga ungdóm okkara upp í krónum og oyrum, men skilagott sparsemi eigur tó ikki at vera ein lastur kortini

Av tí at rættiliga ósing tykist at hava tikið seg upp, serliga í Kommunuskúlanum í Havn í sambandi við, at býráðið hevur viðgjørt viðurskiftini í sambandi við framhaldsdeildina, haldi eg tað vera beint við nøkrum fáum viðmerkingum.

Vit hava sæð ræðsluyvirskriftir sum **tvangsflyting** av skúlanæmingum, um **niðurlegging** av eitt nú Kommunuskúlanum o.s.fr.

Hvaðani hesin óttin ella orsøkin til, hví lærarar á hesum skúla bera slíkar illgitingar fram, er mær óviss-ur, men møguliga er orsøkin misskiljingar. Kanska eru misskiljingarnar orsakaðar av os fáum og ikki nóg góðum fráboðanum frá býráðnum, og hesum vil eg sjálvandi taka mína partvísu ábyrgd av.

Orsøk til uppleggið

Í fleiri ár hava m.a. ymiskir býráðslimir tosað um framhaldsdeildina. Partvíst tí onkur hevur hildið, at framhaldsdeildin kundi fingið eitt betri innihald, og partvíst orsaka av hølistrupulleikum í skúlunum í Vesturbýnum.

Fyri at gera álvara at seta hetta orðaskifti eitt sindur meira í »system« loyvdi undirritaði sær 4. februar í fjør at gera eitt uppleggið at birta uppundir eitt orðaskifti um:

1. At bøta um framhaldsdeildina, og
2. At fáa meira burturúr verandi skúla- og undirvísingarhølunum í býnum.

Úrslitið av hesum varð, at býráðið 20. mars í fjør setti ein arbeiðsbólk at halda fram við arbeiðinum.

Hesin arbeiðsbólkur hevur havt fundir við Skúlaráð, Landsskúlafyrisitingina og skúlastjórarnar.

Skal ein taka stutt samanum hvørja niðurstøðu hesir fundir komu til, kann sigast, at

Skúlanevndin mælti frá at savna alla framhaldsdeildina í eitt stað. Men heit at hevði kundi verið at skapt ein veruligan valskúla undir verandi lógarkarmum og mælti at tað var skilagott at royna okkurt nýskapandi síðsta árið í fólkaskúlahøpi (10. fl.), serliga nú fólkaskúlin er komin í harða kapping við eitt nú eftirskúlar í Danmark.

Landsskúlafyrisitingin gav einki greitt svar, men segði frá, at arbeitt verður við at skapa nýggjar møguleikar fyri 10. flokkarnar. Landsskúlafyrisitingin segði tó, at tað er rætt, at í 10. flokki verða valmøguleikarnir fleiri við nógvum næmingum, tí kravda tímatalið er bara 14 tímar um vikuna.

Skúlastjórarnir hildu, at tað var helst ein ov stórur biti at leggja alla framhaldsdeildina saman í eina, men ein roynd at leggja allar 10. flokkarnar saman kundi vera ein byrjan, sum kundi víst møguleikar, ið ikki vóru royndir áður. Eisini teir vístu á stóra áhugan hjá 9. flokka næmingum at fara til Danmarkar í 10. flokk.

Fara varisliga fram

Síðani tá hevur arbeiðsbólkurin arbeitt víðari við hesum máli, og kom til endans fram til eitt tilmæli at leggja fyri býráðið, har mælt verður til:

1. at felags 10. flokkar verða skipaðir á einum ella tveimum av verandi framhaldsskúlum í samráð við skúlaleiðslu og lærararnar
2. at kanna verður hvussu 8. og 9. flokkur verða skipaðir øðrvísi í framtíðini
3. at endurskoða skúladømini og møguliga strika tey
4. at hugt verður um møguleikarnar hjá kvøldskúlanum/listaskúlanum at fáa innivist í skúlabygningunum hjá kommununi uttan fyri vanliga skúlatíð.

Hetta samtykti býráðið 26. september í ár.

Ein roynd

Tað hevur alla tíðina verið ætlanin at fara sera varisliga fram, og tí fór býráðsumsitingin, sum nú hevði fingið málið at arbeiða víðari við, í fyrstu atløgu at tosa við Eysturskúlan og Venjingarskúlan.

Spurningurin á fyrsta fundinum var, um hesir báðir skúlar vildu royna at gera eina avmarkaða roynd at skipa ein felags 10. flokk á Eysturskúlanum. Og júst her liggur hetta málið í dag.

Fangin hevur tikið Kommunuskúlan ella Argja Skúla upp í fangana, og tí tykist mær ósingina í Kommunuskúlanum eitt sindur løgna.

Miðsavna ella ikki

Væl veit eg, at ymiskar meiningar eru um tað er beint ella skeivt at miðsavna framhaldsdeild. Tað munnu helst vera eins mong sjónarmið fyri sum ímóti, men at gera hetta til ein spurning sum ein als ikki má tosa um, kann eg als ikki góðtaka. Sjálvandi skulu vit eisini tosa um spurningar, sum ymiskar meiningar eru um.

Og heilt spyrjandi standi eg, tá eg havi fingið at vita frá einum av lærarunum í Kommunuskúlanum, úrslitið av einum stílaevni í vár. Evnið var: Hvar fert tú í skúla eftir at tú er liðug/ur við 9. flokk. Ein triðingur av næmingunum svaraðu, at teir fóru heldur til Danmarkar enn í ein føroyskan 10. flokk. Tað sigur ikki so lítið. Og hví skal tað so vera útopi at tosa um hendan 10. flokkin.

Skúlabygging

Sagt verður, at skúlanæmingar kunnu og skulu ikki gerast upp í pengum. Tað kunnu vit skjótt vera samd um. Men tá vit í hesi góðu kommunu, vit búgva í, hava skúla, sum stendur nær um hálvtómur og annan skúla, sum er yvirfyltur, – hvat gera vit so?

Skulu vit so bert láta tann hálvtóma standa hálvtóman og byggja ein nýggjan? Er tað skilagott? Hann, sum heldur tað, má eisini vera greiðir yvir, at ein nýggjur skúli kostar. Og hann kostar skattaprosent. Er ikki betri at nýta verandi høli so skynsamt sum gjørligt, og kunnu vit harafturat fáa ein enn betri 10. flokk – hvat kann tá vera betri?

Eg eri so hjartaliga samdur við Jóhann Samuelsen, skúlaráðslimi, tá hann um 10. flokk skrivar, at býráðið átti at havt skyldu til at koma við einum spennandi og øðrvísi tilboði til tey ungu, so tey veruliga merkja, at her er talan um eitt persónligt skúlaval, sum tey hava høvi til at royna – og vil ein tílík fræls skipan heilt natúrliga skapa eina kapping millum kommunalu skúlarnar – næmingunum at frama.

Ikki kann tað sigast betri – og tað er júst tað, vit hava lagt upp til.

Blíðar heilsur

Torfinn Smith, býráðslimur

Eftirlýsing

Tú ella tit, sum fyri stuttum eru flutt til Føroya, sakna kanska ein pakka við millum annað hesi fittu nissumyndini :

Fagarin fær pakkan við at fara umborð á Teistan, har pakkin hevur ligið seinastu dagarnar.